# Kristoffur Dragaberg 80 ár



Í morgin, leygardagin 22. september, verður Kristoffur Dragaberg í Klaksvík 80 ár. Hann arbeiddi í mong ár við gravimaskinum í Klaksvík, og eitt skifti var hann limur í sóknarstýrinum.

Hóast hann ikki minnist aftur á tíðina, tá ið tey búðu har úti, so roknar Kristoffur seg at vera ættaðar úr Svínoy. Mamman var Anna Sofía, fødd Thomsen og ættað uttan av Bø í Svínoy. Pápin var Óla Jákup Jacobsen, nevndur Óla Jákup millum Garðarnar, og ættaður millum Garðarnar heiman fyri Norðoyri.

Anna Sofía og Óla Jákup giftust í 1914 og bygdu uppi á Heygum í Svínoy. Tey búðu í Svínoy, inntil stutt eftir at Kristoffur var føddur í 1927. Børnini hjá Annu Sofíu og Óla Jákupi vóru Jósef (1914), Marin Malena (1916), Anna Katrina (1918), Lisa (1921), Rasmus (1923), Diana (1925) og Kristoffur (1927). Eftir á lívi eru Marin Malena, sum býr í Sørvági, og Kristoffur.

Í 1949 fekk Kristoffur sær Dragaberg til eftirnavn. Tað boðar eisini frá, hvussu stóran alsk hann ber til heimbygdina.

Í 1951 giftist Kristoffur Helene fødd Weihe og ættað úr Porkeri. Tey búsettust á Bumshamri, og børnini hjá teimum eru Óla Jákup (1951), Elisabeth (1953), Annufía (1958) og Daisy (1964). Tey búgva øll í Klaksvík uttan Annufía, sum býr í Porkeri. Kristoffur eigur 14 abbabørn og trý langabbabørn. Tað var stórur smeitur fyri Kristoffur, tá ið hann fyri nøkrum árum síðani misti konuna.

Kristoffur fór fjúrtan ára gamalur til skips við Carlton. Seinni sigldi hann eitt nú við trolarum hjá Kjølbro sum fýrbøtari, og í fleiri ár róði hann út við Háenni, sum Símun Mikkelsen í Heimistovu í Klaksvík dríftaði.

Tað var nógv byggivirksemi í Klaksvík eftir kríggið og fram í seksti árini, tá ið nógv fólk fluttu aðra staðni frá og til bygdina. Kristoffur koyrdi gravkúgv hjá kommununi, og seinni arbeiddi hann fyri seg sjálvan. Okkurt skiftið hevði hann einar fimtan menn í arbeiði. Eftir at hann gavst við vinnuvirkseminum, hevur Kristoffur fingist við fyrifallandi arbeiði.

Kristoffur varð valdur í sóknarstýrið í Klaksvíkar kommunu í 1962. Hann varð valdur, eftir at pápi hansara leingi hevði sitið í sóknarstýrinum. Kristoffur umboðaði Tjóðveldisflokkin, og hann sat í býráðnum fram til kommunuvalið í 1970.

Kristoffur, sum er trúgvur, familjukærur og sera fryntligur at koma á tal við, er framvegis væl fyri. Hann er partur av býarmyndini, og mest sum hvønn dag gongur hann langar túrar.

J

# Poul Nolsøe Mikkelsen 80 ár



Sunnudagin 23. september verður Poul Nolsøe Mikkelsen í Klaksvík ella Nøddi, sum hann verður nevndur, 80 ár. Hann hevur mest sum alla sína tíð verið fiskimaður og útróðrarmaður, og í unglingaárunum lá tað væl fyri hjá honum í fótbólti. Hesi evnini eru borin víðari í soninum Jákupi, sum í nógv ár hevur verið málverji á landsliðnum og eisini hevur roynt seg sum málverji í Danmark, Noregi og Skotlandi.

Nøddi vaks upp á Vágheygnum. Foreldrini vóru Trina, sum var ættað úr Glasstovuni í Árnafirði, og Jákup, sum var ættaður úr Heimistovu í Uppsølum. Nøddi giftist í 1954 við Ingibjørg fødd Joensen og ættað úr Heimistovu í Svínoy. Tey búgva í barnaheiminum hjá honum á Vágsheygnum. Børnini hjá teimum eru Anna Katrina, Jórun, Jónfríð og Jákup. Anna Katrina býr í Gøtu, Jórun býr á Argjum, Jónfríð býr niðri, og Jákup býr í Klaksvík. Nøddi eigur fimtan abbabørn, og tað er farið at leggjast afturat í næsta ættarliðnum.

Pápin sat við festinum í Heimistovu á Uppsølum. Hann doyði tíðliga, og Nøddi hjálpti í fleiri ár mammuni við garðinum. Hann hevur altíð havt hug til seyð og seyðahald.

Nøddi hevur verið óførur fiskimaður og útróðrarmaður. Systkinabarn hansara, Urbanus Olsen, var skipari á Jógvani S, sum var fyrsta stállínuskipið, ið kom til Klaksvíkar. Hetta var í 1959, og Nøddi var fyrstu tíðina við Jógvani S. Hann sigldi eisini við Klakki, sum beiggi hansara, Símun Mikkelsen, førdi.

Nøddi róði út við eitt nú Poul Jacobi Olsen á Dalinum. Hetta var tá ið hann í fimmti árunum førdi Ørv, og seinni var Nøddi eisini við Ósá, sum Poul Jacob førdi. Nógvu tey seinastu árini hevur Nøddi verið egnari hjá Háenni, sum Poul Jákup Joensen eigur, og sum Poul Johan Joensen førir.

Hugurin til sjógvin hevur verið ógvuliga góður, og Nøddi hevur havt góðar gávur at arbeiða á sjónum. Hann var tikin úr leikum sum egnari, og tá ið hann hevur havt frí frá skipum og bátum, sum hann hevur verið við, eru mangar løtur nýttar í neystinum í Borðoyarvík og umborð á maskinbátinum Oknini, sum hann og bróður hanara Sofus áttu.

Nøddi er ógvuliga áhugaður í ítrótti og serliga í fótbólti. Tað lá væl fyri hjá teimum í Heimistovu. Sofus segðist, eftir at hann var komin aftur úr Danmark, har hann hevði lært, at lyfta fótbóltin í Klaksvík upp á hægri støði, og Emil er tann einasti, sum er eftir at teimum á KÍ liðnum, sum í 1942 vann fyrsta FM heitið í fótbólti. Nøddi spældi sjálvur fótbólt, og hann var eisini við til at vinna føroyameistaraheitið til Klaksvíkar.

Nú dámar honum væl at fylgja við, tá ið KÍ venur og spælir dystir – um tað eru teir smáu ella teir vaksnu – og lagið verður mundandi betri, tá ið tað gongst, sum tað hevur gjørt seinastu mánaðirnar. Hann fylgir eisini væl við í fótbólti kring alt Europa.

Føðingardagurin verður hildin í hølunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag i Bøgøtu sunnudagin, har øll eru hjartaliga væl komin.

J

# Johs Bech-Jensen í Smiðjuni



*Listamaðurin Johs Bech-Jensen hevur í hesum døgum málningaframsýning við føroyskum myndevnum í Smiðjuni í Lítluvík*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Danski listamaðurin Johs Bech-Jensen læt hósdagin 20. september upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin hevur heitið »Vandretur i Torshavns gamle gader« og eru flestu málningarnir við myndevnum úr gomlu Havnini. Eisini eru málningar ymsastaðni frá í Føroyum. Nakrir av málningunum eru akryl á fiburflátu. Hetta er onnur framsýning hansara í Smiðjuni.

Johs er 61 ára gamal og uppvaksin á Stevns á Sælandi. Hann hevur málað síðan 2000 og er sjalvlærdur. Hann hevur fyri nógvum árum síðan búð í Føroyum.

Framsýningin er opin til og við mikudagin 26. september. Allar dagar frá kl. 14-18.

## Prógv



*4. juli 2007 var Marit Mortensen liðug sum Bachelor of Science við útmerkilsi í jarðfrøðisvísindi við Lærda Háskúlan í Aberdeen*